# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*-Vit máttu fjala fangarnar, so serfrøðingar kundu avhoyra teir (George W. Bush).*

# Bush viðgekk loyniligu fongslini




*George W. Bush heldur røðu í Hvítu Húsunum fyrradagin.*

**USA viðgongur nú, at landið hevur loynilig fongsul í øðrum londum. Tey eru neyðug, sigur forsetin.**

Tað var í einari røðu í Hvítu Húsunum fyrradagin, at George W. Bush, forseti, segði, at 14 fangar eru fluttir úr loyniligum CIA-fongslum uttanlands til Guantanamo, har teir skulu rættarsøkjast fyri at hava havt tilknóti til yvirgang.

Hetta er fyrstu ferð, at amerikanskir myndugleikar viðganga, at USA hevur havt loynilig fongsul í øðrum londum, og at fangar eru fluttir millum lond. Men sambært forsetanum hevur tað verið neyðugt at halda upplýsingunum aftur.

-Tað var neyðugt at flyta hesar persónarnar til lond, har vit kundu fjala teir, og har serfrøðingar kundu avhoyra teir, segði Bush.

Sambært sjónvarpinum ABC verða allir fangarnir í teimum loyniligu fongslunum fluttir til Guantanamo í næstum. Teirra millum er Khalid Sheikh Mohammed, sum sambært amerikanarunum legði álopini tann 11. september í 2001 til rættis.

### Evropa visti tað

Í november í fjør avdúkaði blaðið The Washington Post, at USA fjaldi fangar í loyniligum fongslum í Eysturevropa og aðrastaðni, og at CIA brúkti avhoyringarhættir, sum eru í stríð við altjóða reglur. Eingin veit við vissu, hvussu nógvir fangar hava verið í hesum loyniligu fongslunum, men mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch hevur mett talið til umleið 100.

Amerikanska stjórnin vísti ikki tíðindunum aftur, men segði, at alt bleiv gjørt fyri at verja USA og landsins áhugamál. Samstundis setti stjórnin eina kanning í verk fyri at fáa greiði á, hvussu fjølmiðlarnir høvdu fingið upplýsingar um tey loyniligu fongslini.

Sambært The Washington Post hevði CIA loynilig fongsul í Evropa. Ein kanning hjá Evroparáðnum avdúkaði, at CIA hevði fjalt fangar í Pólandi, Rumenia og aðrastaðni. Kanningin avdukaði eisini, at flogfør hjá CIA høvdu flutt fangar í evropeiskum loftrúmi, og at tey høvdu millumlent í fleiri floghavnum so sum í Keypmannahavn, Oslo, Dublin, Milano og Athen. Men kanningin staðfesti eisini, at CIA hevði ikki kunnað flutt fangarnar, uttan at tær evropeisku stjórnirnar vóru vitandi um tað.

# Hava kanska funnið heilivág ímóti fuglakrími

**Kinesiskir granskarar halda seg hava funnið ein heilivág ímóti tí lívshættisliga slagnum av fuglakrími.**

Í dagsins útgávu av tí viðurkenda læknatíðarritinum Lancet greiða kinesisku granskararnir frá, at teir hava loyst tann ringasta knútin, sum granskarar hava fingist við, síðani fuglakrím bleiv staðfest.

Granskarar hava higartil havt ilt við at gera ein heilivág ímóti tí serliga vandamikla fuglakrímslagnum H5N1 uttan at brúka hjálpievni, sum tær stóru heilivágfyritøkurnar hava einkarrætt til. Men nú siga teir kinesisku granskararnir, at teir hava loyst tann knútin við at brúka alum ella dupulsulfat, sum heilivágfyritøkurnar ikki hava einkarrætt til. Tað ger, at heilivágurin kann setast í framleiðslu og seljast alment, skrivar Reuters.

120 fólk hava sjálvboðin roynt tann kinesiska heilivágin, og sum skilst eru royndirnar væleydnaðar.

## Hizbollah hevði russisk vápn

Ísraelski varaforsætisráðharrin, Shimon Perez, vil vera við, at Hizbollah brúkti russisk vápn í bardøgunum við ísraelska herinum í Suðurlibanon herfyri.

-Vit hava sæð vápnini, og tey eru russisk, segði Peres við russiska útvarpið í gjár. Hann segði, at ísraelska stjórnin hevur fingið at vita, at Russland hevur biðið myndugleikarnar í Sýrialandi greiða frá, hvussu Hizbollah hevur fingið fatur á russiskum vápnum. Sýrialand og Iran stuðla Hizbollah, og bæði londini keypa vápn úr Russlandi.

Russisku myndugleikarnir avsanna kortini, at Hizbollah hevur russisk vápn. Ein talsmaður fyri myndugleikarnar í Moskva sigur við AP, at hevur Hizbollah brúkt russisk vápn, so hevur felagsskapurin fingið fatur á teimum einstøku lutunum onkunstaðni og síðani sett vápnini saman.

## Mannfall gevur trupulleikar

Í Kanada er stjórin um at koma í trupulleikar, eftir at 16 kanadiskir hermenn hava latið lív í Afghanistan tríggjar teir seinastu mánaðarnar.

Tað lutfalsliga stóra mannfallið hevur fingið andstøðuna at krevja, at Kanada skal taka sínar 2.300 hermenn úr Afghanistan. Kravið hjá andstøðuni er, at afturtøkan byrjar beinanvegin, og at teir seinastu kanadisku hermenninir skulu fara úr Afghanistan um tríggjar mánaðir.

Fyrr í ár samtykti ein meiriluti í kanadiska tjóðartinginum, at hermenninir skulu verða verandi í Afghanistan hálvt annað ár afturat. Meiningakanningar vísa, at kanadiumenn eru sera ósamdir um luttøkuna í Afghanistan. Ein lítil meiriluti heldur tó, at hermenninir skulu takast heimaftur.

## Ráðharri í anglettinum



Meiri enn 60 altjóða serfrøðingar í eyðkvæmi krevja, at heilsumálaráðharrin í Suðurafrika, Manto Tshabalala-Msimang, skal leggja frá sær alt fyri eitt. Orsøkin er, at hon hevur sagt suðurafrikanskum HIV-smittaðum, at tey verða frísk, um tey eta hvítleyk, sitrón og reyðrøtur.

Orð hennara hava elvt til øsing millum serfrøðingar, og teir hava biðið Thabo Mbeki, forseta geva ráðharranum sekkin beinanvegin. Teir 60 siga í einum brævi til forsetan, at orð ráðharrans eru einki minni enn ein vanlukka. Teir vísa samstundis á, at nógvir suðurafrikanarar doyggja av HIV, tí teir fáa ikki tann neyðuga heilivágin. Millum tey 60, sum hava skrivað undir áheitanina, er Robert Gallo, sum gjørdi ta fyrstu blóðroyndina, ið kundi ávísa HIV-smittu.

Sambært AP sýtir forsetin fyri at koyra heilsumálaráðharran frá, men hann hevur sagt, at heilsumyndugleikarnir mugu útvega fólki betri upplýsingartilfar um HIV.